

Í 2007 setti ein kavbátur eitt russiskt flagg á havbotnin á Norðpólin.

# Russland vil hava ræðisrættin yvir Norðpólinum

**Jógvan Hugo Gardar**

05.08.2015 - 10:41

Oljan.fo

Russland hevur nú alment kravt at Norðpólurin skal vera russiskur. Hetta skrivar Barents Observer. Keldan er russiska tíðindastovan RIA Novosti. Russland hevur sent inn til ST sína niðurstøðu um hvar tey halda at markið fyri norðan skal ganga.

Kravið hjá russum er at eitt 1,2 milliónir ferkilometra stórt øki skal góðkennast sum russiskt. Niðurstøvan kemur frá teimum kanningunum sum russar sjálvir hava gjørt av havbotninum í Arktis.

Nú er tað upp til ST og nevndina fyri landgrunnar st meta um Russland hevur rætt í sínum kravi. Russland hevur einaferð fyrr sent inn eitt líknandi krav, men tá fingu teir alt

sendandi aftur, við kravið um betri prógv, og neyvari avmarkingar av hvar markið skal vera, sambært Russlandi.

Politiken skrivar at russiska kravið er í stríð við tað kravið sum Danmark sendi til ST í desember 2014. Danska kravið er at Grønland skal hava eintt 200 fjórðingamark norðanfyri Grønland, og hetta vil røkka um Arktiska havið yvir til 200 fjórðingamarkið hjá Russlandi.

Danmark, Føroyar og Grønland hava í 12 ár arbeitt við fýra ymiskum krøvum um økir, har økið norður móti Norðpólinum er eitt. Higartil eru brúktar 330 milliónir krónur til hetta arbeiði.

Serfrøðingar eru sera ymiskir á mali um virði av hesum stóra havøkinum. Sambært Barents Observer er økið sum Russland nú ynskir at gera til russiskt, áhugavert, tí metingar siga at talan kann vera um minst 600 oljuøkir, og minst 150 gassøkir á hesi leiðini. Harafturat kemur at ein meinar at kunna finna bæði gull og nikkel har.

Sambært Aftenposten eru tað serfrøðingar sum meina at øki ikki kemur at geva nakað sum helst av virðum av tí slagnum sum russar vóna.

Umframt Grønland og Russland kunnu Kanada, Noreg og USA koma við krøvum um at eiga Norðpólin – ella part av honum.

Í 2007 setti ein russiskur kavbátur russiska flaggið á havbotnin har Norðpólurin er.